UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:
## Samstarva

Í Danmark eru realkreditfelagið Nykredit og Jyske Bank farin í samstarv. Tað ber m. a. í sær, at Jyske Bank skal mæla fólki til at nýta teir lánsmøguleikar, sum Nykredit veitir sínum viðskiftafólki. Herumframt hava kreditfelagið og bankin stovnað eitt nýtt KT-felag, sum skal geva báðum fyritøkunum ávísar fyrimunir.

Nykredit og Jyske Bank vænta, at tað nýggja samstarvið fer at útvega teimum einar 50 mió. krónur um árið.

## Færri bilar

Stóra týsk-amerikanska bilverksmiðjan DaimlerChrysler væntar, at fyritøkan fer at selja sjey prosent færri bilar í ár enn í fjør. Uppruna-liga væntaði fyritøkan at selja 16 milliónir bilar í USA í ár, men nú er talið sett til 15 milliónir.

DaimlerChrysler hevði næstan fimm milliardir krónur í halli í fjør, og hóast fyritøkan væntar at selja færri bilar í ár, væntar leiðslan javnvág í roknskapinum. Fyritøkan vænta eisini, at bilasølan fer at veksa seinni, og í 2004 roknar DaimlerChrysler við at selja bilar og eykalutir fyri meiri enn 1.000 milliardir krónur.

## Stríð um prís

Danski ferðslumálaráðharrin Flemming Hansen umhugsar at gera tað bíligari hjá fólki at ferðast um Stórabelti. Ætlan hansara er, at tey, sum nýta tað fasta sambandið nógv, skulu fáa størri avsláttur, enn tey fáa nú, meðan tey, sum bara ferðast av og á, skulu rinda tað sama sum nú.

Flestu flokkarnir í Fólkatinginum taka undir við ráðharranum, men fleiri kommunur í Eysturjútlandi og Norðursælandi mótmæla. Tær bera ótta fyri, at príslækkingin fer at taka grundarlagið undan ferjunum, sum sigla um Kattegat.

# Bush bað Kina hjálpa sær



*George W. Bush og kinesiski forsetin, Jiang-Zemin*

*Mynd: Reuters*

**Amerikanski forsetin, George W. Bush, segði í gjár, at USA vil fegið hava samband við Norðurkorea**

BUSH Í ASIA
*Árni Joensen*

Tá amerikanski forsetin, George W. Bush, fyrr í vikuni vitjaði í Suðurkorea, nýtti hann høvi at vitja á markinum millum tey bæði koreansku londini. Haðani hugdi hann inn í Norðurkorea, sum hann í síðsta mánað setti í bás saman við Irak og Iran sum "óndsinnað veldi".

Undir vitjanini í Seoul segði Bush kortini, at hann tók undir við royndunum hjá suðurkoreanska forsetanum, Kim Dae Jung, at bøta um viðurskiftini millum tey bæði grannalondini.

Og tá Bush í gjár vitjaði í Kina, boðaði hann frá, at hann hevði biðið kinesiska forsetan, Jiang-Zemin, bera norðurkoreanska leiðaranum, Kim Jung-il, boð um, at amerikanska stjórnin er til reiðar at tosa við stýrið í Pyongyang.

- Vit eru til reiðar at tosa við norðurkoreanska stýrið, og eg bað Jiang-Zemin hjálpa mær at bera norðurkoreanska leiðaranum boðini, segði George W. Bush á tíðindafundi, eftir at hann hevði tosað við kinesiska forsetan.

USA hevur fyrr róð uppundir, at Kina hevur latið Norðurkorea ymsa kjarnorkutøkni, men hesum hevur kinesiska stjórnin víst aftur, og tað gjørdi Jiang-Zemin eisini í gjár.

### Taiwan

Taiwan var sum vera man ein av teimum stóru spurningunum, sum var til umrøðu á fundinum. Tá Bush í fjør gjørdi av at skriva undir ta størstu amerikansku vápnasøluna til Taiwan í mong ár, elvdi tað til stóra misnøgd í Kina.

Bush segði á tíðindafundinum í Beijing í gjár, at USA hevur framvegis somu støðu í Taiwan-málinum. Hann segði, at USA fer framvegis at veita Taiwan hernaðarligan stuðul, men legði afturat, at ætlanin við hesum er ikki at elva til trupulleikar.

Almenna kinesiska støðan er, at Taiwan er ein landspartur, sum á ólógligan hátt hevur tikið seg burtur úr kinesiska samfelagnum, og Kina hevur hótt við hernaðarligum álopi á Taiwan, um leiðslan har ger av at lýsa oynna sum sjálvstøðugt ríki.

# Jospin bjóðar Chirac av

**Sosialistaleiðarin Lionel Jospin hevur gjørt av at bjóða Jacques Chirac av á forsetavalinum í apríl**

FRAKLAND
*Árni Joensen*

Tað hevur leingi verið væntað, at Lionel Jospin fór at stilla upp til forsetavalið, men ikki fyrr enn nú hevur hann boðað frá, at hann verður valevni.

Jospin er í løtuni forsætisráðharri í sosialistisku stjórnini, og hann verður uttan iva tann harðasti kappingarneytin hjá verandi forsetanum, Jacques Chirac, sum í síðstu viku kunngjørdi, at hann fer at royna at verða afturvaldur.

Lionel Jospin sigur, at sum forseti ætlar hann sær at royna at endurreisa ábyrgdarkensluna sum tað berandi í samfelagnum, og at hann eisini ætlar sær at vísa ábyrgd sum forseti.

Hendan fráboðanin er uttan iva ætlað Chirac, sum fleiri ferðir hevur verið fyri atfinningum frá sínum egnu, sum vilja vera við, at hann er lopin frá teimum lyftum, sum hann gav í valstríðnum í 1995.

Úr Norðurlondum:
## Kavaveður

Nakað av kava kom niður í Danmark mikudagin, og ferðslan varð nógv tarnað. Serliga í Miðjútlandi og á Sælandi órógvaði kavin ferðsluna, og fleiri av teimum smáu vegunum vórðu stongdir. Tað hevði við sær, at fleiri skúlar sendu børnin i til hús mitt í skúlatíðini.

Eisini motorvegurin millum Århus og Randers mátti steingjast, og løgreglan mælti fólki frá at fara í bilin. Fleiri hundrað fólk máttu gista í skúlum og aðrastaðni hósnáttina, meðan onnur valdu at verða sitandi í bilinum.

Løgreglan valdi at boðsenda teimum serligu manningarvognunum hjá herinum. Teir hava víst seg at vera sera hentir í kavaveðri, og mikudagin og gjáranáttina var boð eftir teimum átta ferðir til kvinnur, sum vóru komnar til at eiga.

## Út úr býnum

Ein lesarakanning hjá norska blaðnum Aftenposten vísir, at flestu fólk í Oslo vilja hava amerikansku sendistovuna úr býnum.

Leiðslan á sendistovuni hevur biðið býráðið í Oslo um loyvi at gera eina tríggjar metrar høga girðing rundan um sendistovuna, at eitt ávíst pláss kring húsini verður roknað sum trygdarøki, og at myndugleikarnir skulu avmarka ferðsluna í trimum gøtum við sendistovuna. Kunnu býarmyndugleikarnir ikki góðtaka hetta, vilja amerikanararnir hava eitt øki í býnum, har teir kunnu byggja eina nýggja sendistovu.

Býráðið hevur longu sýtt fyri at geva sendistovuni annað øki. Tí verða tey ymsu trygdartiltøkini helst sett í verk, men ráddu Oslobúgvar, skuldi sendistovan flutt úr býnum.

Lesarakanningin hjá Aftenposten vísti, at fleiri fólk vilja hava sendistovuna úr Oslo orsakað av vandanum fyri yvirgangsatsóknum.

# ítróttur

Nr. 37 • fíggjadagur • 22. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

H71-VÍF 30-39 (16-17):
# Risa styrkismunur

**VÍF tók sær av løttum í nærum trý korter, men tá ferð varð sett á, høvdu hoyvíkingar einki at skula sagt**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Onkursvegna hava dystirnir dystirnir millum H71 og VÍF ofta verið sera javnir, hóast tað hevur verið rættiliga ymiskt, hvussu liðini hava staðið seg í kappingini. Soleiðis varð eisini í grundspælinum, tá VÍF misti eitt av bert tveimum stigum ímóti júst H71, og soleiðis sá tað eisini út til at skulu verða, tá VÍF so vitjaði aftur hósdagin.



*Her sær út til, at hoyvíkingarnir hava gott tak á, men tá alt kom til alt, vóru tað vestmenningarnir, sum vóru við yvirlutan*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### VÍF setti ferðina

Tað var nevnliga soleiðis, at fyri tað mesta, so høvdu hoyvíkingarnir sera stutt tjóður í meistarunum.. Gaman í var sjónligt, at vestmenningar høvdu tað betra liðið. Málini hjá teimum komu munandi lættari enn hjá hoyvíkingunum, og ongan tíð í dystinum vóru teir á heimaliðnum frammanfyri. Men við skotstyrkini hjá Bjarna og Halgir megnaðu hovyíkingar alla tíðina at svara aftur upp á málskjótingina hjá VÍF. Munurin var tó fyri tað mesta eini tvey - trý mál, men seinastu løtuna gjørdu heimamenninir ein vørr, soleiðis at tað var mest sum stantum, tá farið varð út aftur til seinna hálvleik.

Eftir at hoyvíkingarnir her í einar tíggju minuttir framvegis hildu fast, so fóru vestmenningarnir brádliga at prógva, hví teir so ofta vinna tepurt, móti liðum, sum eru nógv veikari. Frágreiðingin er einfalt tann, at VÍF er so nógv sterkari enn hesi.

Fyrst skeyt Piti fýra mál á rað, so eitt hol varð skapt, og tá hoyvíkingar royndu at svara aftur, fekk VÍF aftur fimm mál á rað.

Hetta viðførdi tó, at vestmenningarnir aftur kundu taka sær av løttum, og spakuliga komu hoyvíkingarnir aftur. Fýra mál á rað minkaðu munin í eina helvt, men so var eisini liðugt. VÍF gjørdi aftur ein vørr upp á fimm mál, og so var allur ivi beindur burtur, og oddaliðið hevði vunnið ein hóast alt rættiliga sannførandi sigur.

### Bara munur er

Tað hvur ofta verið ført fram í ár, at VÍF hevur havt okkurt slag av motivatiónstrupulleikum, tá spælt verður móti niðaru liðunum í deildini. Kanska er tað eisini so, og møguliga er tað orsøkin til, at liðið lutfalsliga sjáldan vinnur stórsigrar.

Onkur klókur venjari hevur tó onkun tíð sagt, at um tú ígjøgnum eitt heilt ár skjýtur eitt mál meira enn mótstøðuliðið, so verður tú meistari, og tað tykist vera hetta, sum vestmenningar hava í tonkunum, tá spælt verður. Leikararnir vita við sær sjálvum, at teir til eina og hvørja tíð kunnu seta meira ferð á, og so bilar tað ikki so nógv, um munurin ikki verður hin øgiliga. Tað er nóg mikið, at munurin er har.

### Dysturin í tølum

H71-VÍF 30-39 (16-17)
**Málskjúttar:**
H71: Bjarni Wardm 9(2), Finnur Hansson 7, Halgir Dahl Olesen 6(1), Olaf Vestergaard 2, Johnny Durhuus 1, Jákup á Borg 1
VÍF: Piti Negru 11(1), Ingi Olsen 9, Sámal Joensen 8, Johnny Joensen 5, Daniel R. Lápa 3, Agnar Joensen 2, Petur Fr. Joensen 1
**Brotskøst:** H71 3, VÍF 1
**Útvísingar:** H71 3, VÍF 2
**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Uni Wardum. Høvdu ikki tað stóra at takast við, tí talan gjørdist ongan tíð um nakran hart spældan dyst.

# Tórshavn Open

Árliga kappingin hjá Havnar Badmintonfelag, Tórshavn Open, varð leikt í Badmintonhøllini í Havn um vikuskiftið. Hópin av leikarum í øllum aldursbólkum tóku lut í kappingini, sum byrjaði leygardagin og helt fram alt vikuskiftið.

Niðanfyri prentað vit nøvnini hjá fremstu luttakarunum í øllum aldursbólkunum.

**Gentur 11 ár**
1 Brynhild Carlsson HBF
2 Konni Kass Jacobsen HBF

**Dreingir 11 ár**
1 Reidar Luid HBF
2 Fríði Lamhauge HBF

**Gentur 13 ár**
1 Brynhild Carlsson HBF
2 Guðrun Lervig ÍF

**Dreingir 13 ár**
1 Reidar Luid HBF
2 Filip Gram MBF

**Gentur 15 ár**
1 Rannvá á Rógvi VÍF
2 Ulla í Dávastovu VÍF

**Dreingir 15 ár**
1 Niclas Eysturoy HBF
2 Rógvi Poulsen HBF

**Dreingir 18 ár**
1 Niclas Eysturoy HBF
2 Rógvi Poulsen HBF

**Kvinnur**
1 Guri Poulsen HBF
2 Ingun Hansen Strálan

**Menn**
1 Ragnar Simonsen HBF
2 Erland Poulsen HBF



*Brynhild Carlsson og Konni Kass Jacobsen vunnu kappingina í yngsta gentubólkinum, tá kappast varð í Tórshavn Open um vikuskiftið*

## Hondbóltsstøður

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 7 | 7 - 0 - 0 | 571 | 472 | 99 | 25 |
| 2 | Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 559 | 473 | 86 | 18 |
| 3 | StÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 494 | 482 | 12 | 14 |
| 4 | Kyndil | 7 | 3 - 1 - 3 | 448 | 492 | -44 | 9 |
| 5 | H71 | 7 | 0 - 2 - 5 | 527 | 573 | -46 | 8 |
| 6 | Tjaldur | 6 | 2 - 0 - 4 | 455 | 511 | -56 | 8 |
| 7 | KÍF | 7 | 1 - 1 - 5 | 497 | 548 | -51 | 7 |